# GARVILT!

Í SKYGGJANDI GLÆMUNI FRÁ SVARTA OG **GARVILLA** LÍVSVERKI **INGÁLVS**, GONGUR HANSARA ÓMETALIGI TÝDNINGUR NÚ AV ÁLVARA UPP FYRI GÁNANDI GESTUNUM Á **FRAMSÝNINGINI** Á LISTASAVNINUM



**UMMÆLI**
Kinna Poulsen
kinna_poulsen@hotmail.com

Einki er so vist sum tað, at tygara ummælari fer aftur í Listaskálan at hyggja, áðrenn henda framsýning er at enda komin, tí stórfingnari og áhugaverdari minnisframsýning skalt tú leita leingi eftir. Men sum skilst hongur framsýningin »Ingálvur av Reyni 1920-2005 – Svartur og villur« í Listasavninum til 28. februar 2010, so høvið er at fara aftur at vitja framsýningina upp til fleiri ferðir, og hetta kann gerast neyðugt, skalt tú náa at hyggja nágreiniliga at hesum 150 verkunum, ið øll hava tað uppiborið so ella so.

Framsýningin er næstan ørkymlandi, so stór er hon, men áhugavert er at fylgja gongdini hjá leitandi listamanninum frá teimum fyrstu royndunum til læruárini hjá Bizzie Høyer og víðari til ta freistandi løttu loysnina í mótsetningslitskipanini hjá akademilæraranum Aksel Jørgensen. Hesar litríku landslags- og býarlýsingar eru als ikki vánaligar, um tær ikki eru eins originalar og sterkar og tær seinnu myndirnar, tá Ingálvur av Reyni verður forloystur í gráum og svørtum, og Jack Kampmann hjálpir honum við at gerast varugur við styrkina í einum tálmaðum litavali.

Her hanga dømi um listarlig gjøgnumbrot so sum ein av nonfigurativu kompositiónunum við heitinum »Kurpali« og kvirra, afturlatna meistaraverkið »Gráur morgun« saman við dapra verkinum »Tey ganga á vegnum og bíða«, tá Ingálvur á fyrsta sinni roynir seg við eini størri figursamanseting. Tað er serliga áhugavert at síggja tær nýggjaru monumentalu kompositiónirnar, sum vit hava sæð ymsastaðni á framsýningum, á Listasavninum, Den Frie osfr., men sum eru læntar frá privatum og almennum stovnum bæði innan- og uttanlands, og sum vit nú hava møguleikan at uppliva sum partar av einari stórslignari heild.

## Tað besta

Tú kennir teg evarska lítla og týdningarleysa framman fyri hesum myrku, gloðandi løriftunum, ið sum veldugar apoteosur reisa seg uppi yvir tær í abstraktum, ekspressivum myndum, sum innihaldsliga tykjast snúgva seg um júst tað sama eksistentiella evnið, um stokkutu tilveru einstaklingsins, sum hjálparleysur eitt lítið bil rekur á havi alheimsins, meðan hann roynir at geva seg til kennar. »Trolaradekk« (1999), sum Listasavnið eigur og »Brimbrot. Kolandi ódn«, sum Statens Museum for Kunst keypti í 2003, eru báðar millum tað allarbesta, sum Ingálvur av Reyni hevur gjørt, og sum á løgnan hátt geva hugasamband við »Bardagan við San Romano«, sum Paolo Uccello málaði í 15.øld. Tað er sami dynamikkur og litaval, ið merkir báðar myndirnar og aðrar av teimum stóru kompositiónunum við á framsýningini, har vit eisini kunnu uppliva eina serstakliga áhugaverda parafrasu frá 1979 yvir hesa stóru fyrimyndina hjá Ingálvi av Reyni.

## Ein skilagóð introduktión

Bókin, sum er givin út í sambandi við minnisframsýningina, er stór og prýðilig við reyðsvørtu permuni og hópin av myndum og áhugaverdum teksti, sum danski, kendi listfrøðingurin Mikael Wivel hevur skrivað á donskum, og sum er týddur til føroyskt og enskt.

Teksturin við undirheitinum »Ein introduktión um Ingálv av Reyni og list hansara« lýsir á skilagóðan hátt menningina hjá málaranum og tekur støði í Mikinesmálaranum, sum høvundurin heldur gerast verri listamann við árunum mótsett Ingálvi, ið gjørdist betri. Sjálvt um hetta á ein hátt er rætt, mugu vit nú ikki gloyma dygdirnar og ósamanberligu styrkina í eldri myndunum hjá tí viðkvæma Mikines, men tað haldi eg heldur ikki, at høvundurin ger.

Mikines verður nýttur sum samanbering av tí, at hann á mangan hátt er ymiskur frá Ingálvi av Reyni, tó at verkini hjá báðum listamonnum hava eksistentiellan dám: ”Tískil var tematikkurin enn serstakliga føroyskur, har menniskjað varð lýst í samljóði við og sum andsøgn til náttúrumegina. Men hjá Ingálvi varð hann lyftur upp á eitt annað og heldur abstraherandi støði, har dramatikkurin ikki lá so nógv í sjálvari frásøgnini, sum hann lá í arbeiðnum við teimum fýra, grundleggjandi eindunum sum eru treytin fyri, at ein mynd skal eydnast: flatar, litir, strikur og rúm – í júst hesi raðfylgju.” (s.116).

Satt at siga fái eg lætt útslett av setningum sum ”Føroyingar eru jú ikki sorgblíðir rættiliga leingi í senn, um vit skulu trúgva tjóðarskøldum sum Jørgen-Frantz Jacobsen, Williami Heinesen og Regini Dahl..”, tí teir minna meg um niðurlátandi jovialkoloniala tónan í fleiri tekstum, sum uttanfyristandandi skriva um føroyska fyribrigdi.

Men hesum heldur Mikael Wivel seg sum heild frá í tekstinum, ið sum heild er merktur av hollu listsøguligu vitan hansara. William Heinesen, Bárður Jákupsson, Gunnar Hoydal og Finn Terman Frederiksen hava allir viðgjørt listina hjá Ingálvi av Reyni á hvønn sín áhugaverda hátt. Tað, sum er nýtt í hesi viðgerð Wivels er millum annað, at teknilærarindan Bizzie Høyer verður tillutað størri týdning fyri abstraktiónina í seinni myndunum hjá Ingálvi, og hóast eg haldi hesa meting vera alt ov avgjørda, er hetta sum heild áhugaverd vitan, sum verður víðariførd. Serstakliga áhugavert er at lesa um tey ymisku listasøguligu sporini, sum Wivel sær í myndunum hjá Ingálvi frá danskari, franskari og amerikanskari myndlist

## Svartur sannleiki?

Skulu vit loyva teirri kritisku røddini framat, og tað skulu vit sjálvandi, kunnu vit undrast á, at framúrskarandi filmurin um Ingálv av Reyni Svartur sannleiki (1999) ikki er at síggja á hesi annars so umfatandi og pedagogiskt disponeraðu framsýningini. Harumframt tykist framsýningin eitt sindur óruddilig í støðum, men hetta kemst helst av, at so nógv er við á framsýningini.

Ein kundi eisini undrast á, at framsýningin lat upp í ár og ikki næsta ár, eins og ein kundi funnist at sjálvum evnisvalinum, tí vit kunnu skjótt semjast um, at eitt nú Elinborg Lützen meira enn Ingálvi tørvar eina bók, so at kunnað verður um hennara meistaraverk.

Tó er tað sum um, at allar hugsandi atfinningar hava lyndi at hvørva í svart skyggjandi glæmuni frá lívsverki Ingálvs (svartur og garvillur), hvørs ómetaligi týdningur fyri føroyska myndlist nú av álvara gongur upp fyri øllum okkum gánandi framsýningargestum.



*Gátuføra og afturlatna verkið »Gráur morgun«*